# Trivnaðarátak - Betri vinir í grunddeild

**Átakið:** Trivnaðarátakið verður skipað sum verkætlan millum áhugaðar skúlar, Lærarafelagið, Barnabata, Nám og Undirvísingarstýrið skúlaárið 2023/24.

**Endamál:** At royna og eftirmeta føroyskt tilfar, sum er ment við tí endamáli at styrkja trivnaðin og menna eina góða mentan í flokkinum.

Góður trivnaður og góð floksmentan eru ikki altíð ein sjálvfylgja. Sambært Lærarafelagnum og Skúlaleiðarafelagnum er felagsskapurin í skúlanum undir trýsti, og tørvur er á føroyskum tilfari, sum kann brúkast í arbeiðnum við trivnaði og góðari floksmentan.

Betri vinir er tilfar, sum byggir á fýra grundvirði: tolsemi, dirvi, virðing og umsorgan. Ítøkiligt er talan um eitt kuffert við ymiskum tilfari og amboðum, t.d. samrøðutalvur, sanghefti, aktivitetshefti, bamsur.



Betri vinir hevur sín uppruna í donsku verkætlanini Fri for Mobberi, sum Red Barnet og Mary Fonden í Danmark hava sett á stovn og ment. Tilfarið tekur støði í avstralsku skránni Better Buddies og byggir á verandi gransking innan økið.
Kanningar hava víst, at børn fáa gott gagn av, at starvsfólk brúka Betri vinir tilfarið, og at førleikar sum empati, sjálvregulering og samstarv vórðu mentir (Effektevaluering: Fri for mobberi og børns socioemotionelle kompentencer ).

Barnabati hevur áður lagað tilfarið til føroysk til børn í dagstovnaaldri, og verður hetta brúkt við góðum royndum (Barnabati: Úrslit frá fyrstu spurnakanning til starvsfólk á dagstovnaøkinum).
Tilfarið verður nú lagað til føroyskt til næmingar í grunddeild.

**Innihald og karmar**:

Allir luttakararnir fáa skeið i Betri vinir tilfarinum. Skeiðið fevnir um ein skeiðsdag, sum verður avtalaður við luttakandi skúlarnar. Tá fáa starvsfólkini í grunddeildini undirvísing í ástøðunum handan tilfarið, umframt í hvussu ymisku amboðini kunnu brúkast. Harumframt verða uppfylgjandi fundir og námsfrøðilig og didaktisk sparring úti á luttakandi skúlum. Undirvísingarstýrið rindar vikarútreiðslurnar í tann mun, tað er neyðugt.

Væntað verður av skúlunum, at verkætlanin verða løgd í ársætlanina og tímatalvuna, og at lærarnir fáa tíð til fyrireiking, ráðlegging, og eftirmeting í sambandi við verkætlanin.

Verkætlanin verður í fyrsta umfari skipað soleiðis: í august 2023 verður verkætlanin sett í verk á 2 skúlum. Í januar 2024 verður verkætlanin sett í verk á 2 skúlum afturat.

**Eftirmeting og tillaging:**
Fyri at vita um Betri vinir tilfarið hevur gagnliga ávirkan á næmingarnar og felagsskapin í flokkinum, verða trivnaðarmátingar gjørdar áðrenn og aftaná, at átakið er sett í verk.

Tilfar og tilgongd verða eftirmett saman við luttakandi skúlum og starvsfólkum, og verða neyðugar tillagingar gjørdar út frá tí.

**Málbólkur:** Grunddeild í fólkaskúlanum + AKT lærarar.
**Undirvísara:** Betri Vinir ráðgevar Tóra Joensen og Áki Dyssegaard.
**Tíðarskeið:** Alt skúlaárið 2023/24

**Tilmelding:** Saman við tilmeldingini skal skúlin senda ein motiveraða umsókn, sum lýsir og grundgevur fyri, hví skúlin er sinnaður at verða við í verkætlanini. Tilmeldingarfreistin er 1. mars 2023. Tilmeldingin skal sendast sum teldupostur til nam@nam.fo

Eru spurningar um innihald, tilgongdina o.a. ber til at seta seg í samband við Tóru Petersen, trivnaðarráðgeva í Námi á tlf. 555184 ella torap@nam.fo. Eru spurningar um tímar o.a. kunnu tit venda tykkum til Magnus Tausen, fulltrúa í Undirvísingarstýrinum á tlf. 555029 til magnusT@uvs.fo.

## Tilmelding og umsóknarblað
## Trivnaðarátakið - Betri vinir í grunddeild

Fyll skjalið út og send til: nam@nam.fo

Tilmedingarfreist 1. mars 2023

<table>
<tr><td>Skúli</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>Stjóri</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>T-post:</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>TLF:</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>Tal av flokkum í grunddeild</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td rowspan="2">Tal av næmingum í hvørjum flokki í grunddeild (væntandi)</td><td>Forskúli</td><td>1. flokkur</td><td>2. flokkur</td><td>3. flokkur</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td rowspan="2">Tal av flokslærarum og lærarum, íroknað AKT í grunddeild</td><td>Flokslærarar</td><td>Lærarar</td><td>Námsfrøðingar</td><td>AKT - Lærari</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td colspan="2"></td></tr>
<tr><td colspan="5">Lýs og grundgev stutt fyri, hví tykkara skúli er sinnaður at verða við í átakinum</td></tr>
<tr><td colspan="5"></td></tr>
</table>

NÁM